# Skuggin í Steinatúni

Tað var altíð ferð á í Steinatúni. Tað var, sum lívið sjálvt rann har – fólk við tómum eygum, sum flugu framvið, og eingin hugdi upp.
Hann sat mitt í øllum, men ongin sá hann. Regnið rann niður eftir ermunum, og hann helt um jakkan, sum var vátur av kuldanum undir beinkinum.
Hendurnar vóru stívar, og hann visti ikki, um tað var av veðrinum – ella av øllum tí, hann bar inni í sær.

Mitt í viku: skúlanæmingar, konufólk við innkeypsposum, menn í slipsi á veg heim frá arbeiði.
Fólk, sum skundaðu sær, við eygunum fast bundnum at telefonini.
Tey fóru framvið honum, sum um hann var luft.
Onkur hugdi, men vendi sær burtur, beinanvegin hann fekk eygnasamband.
Tað var so vanligt, at hann merkti tað ikki longur.

Um vikuskiftið var øðrvísi í Steinatúni.
Tá fyltist alt við ljósi, røddum og lukti.
Fólk stóðu í kø uttan fyri Blábar, har tónleikurin bumbaði út gjøgnum hurðina.
Pizzaluktur blandaðist við bensini og regni, meðan taxabilarnir bíðaðu eftir fólki, sum hildu seg vera lívsins kongar.
Hann sat á beinkinum mitt í øllum tí livandi – og kendist deyður.

Hann sá eitt ungt par bíða eftir taxabili. Gentan helt í hondina á manninum og flenti.
Hann hugsaði:
"Eg hevði eisini eina tíð, har onkur leiddi meg."

Við síðuna av honum sat Mika.
Ein troyttur, gamal maður við eini øl og eini sigarett millum gulnaðu fingrarnar, meðan roykurin lá sum mjørki yvir høvdinum á honum.
Hann sat har næstan hvønn dag, róligur og eygleiðandi, sum um hann hevði sæð alt fyrr.
"Tú fært ongan frið, fyrr enn tú gevur upp," segði hann einaferð.
Hann visti ikki, hvat tað merkti.
Men orðini sótu føst.

Mika plagdi at tosa um sonin, sum ikki tók telefonina longur. Tað var altíð sama søgan, men hann segði hana við einari uppgevandi rødd, sum bara ein, ið hevur mist alt, kann hava.
Kanska tí dámdi honum Mika.

Ein dag var Mika burtur.
Eingin spurdi.
Eingin saknaði hann.

Hann var bara ein av fleiri, ið ikki sóust aftur.
Teir, sum blivu burtur, vóru altíð teir, sum ongantíð ordiliga vóru har.

Tá alt byrjaði, var hann ein heilt annar.
Fitness-staðið var hansara kirkja.
Tað var har, hann fann meining, styrki og vinir.
Har var hann tryggur – lyftandi, sveittandi, brosandi.
Tað var har, hann og Teitur lærdu at trúgva upp á seg sjálvar.
Teir vandu saman hvønn dag, kappaðust um rep's og tosaðu um lív og framtíð.
"Fit, focused, fearless," segði Teitur altíð við einum brosi.
Tað var teirra trúarjáttan.
Teitur var altíð tann, sum helt honum uppi. Teitur tosaði um framtíð - hann bert um dagin í dag. Tá Teitur læt jørnini falla, var tað við lættleika – hjá Teiti var styrkivenjing ein leikur, hjá honum ein flýggjan.

Men hóast hann lyfti jarn, so var tað altíð nakað, hann ikki orkaði at lyfta – tað ósjónliga trýstið.
At fáa tíðina at strekkja til.
At liva upp til krøvini frá øllum, eisini sær sjálvum.
Tá pínan kom – bæði sálarliga og likamliga – byrjaði hann at leita eftir hjálp.
Ein dagin, tá teir høvdu vant og vóru troyttir av jarnlyfti og svørjandi, sveisandi speglum, kom ein eldri maður í svørtum leggings og tanktoppi yvir til teirra. Hann var altíð har, eitt sindur stillari enn hinir, men við sjónligum æðrum niður eftir ørmunum, sum allir í fitness-staðnum høvdu lagt merki til. Hann smíltist hálvt, meðan hann turkaði sveittan av pannuni.
"Tit venja nógv," segði hann. "Men orkan fer, ha?"

Teitur flenti og segði okkurt um svøvn og protein.

Men sjálvur svaraði hann einki. Hann hevði ikki sovið væl í vikur. Hendurnar stirðnaðu, og høvdið var tungt.

Maðurin nikkaði, sum um hann hevði sæð tað ofta. "Eg havi nakað, sum hjálpir," segði hann. "Bara eitt boost. Tað ger einki, bara eitt boost, tú følir teg klárari, og blívur meira fokuseraður. Eg brúki tað sjálvur, men bara tá eg eri troyttur." Hann tók ein lítlan plastposa upp úr taskuni - nakrar fáar hvítar tablettir, leysar og ómerktar. "Ritalin," segði hann lágmælt. "Tú følir teg sum eina maskinu. Einki stress, bara fokus."

Teitur flenti og peikaði eftir honum: "Jamen ja, lat hann prøva, hann er troyttasti maður í Havn!" Hann smíltist játtandi, men tankarnir tóku at ivast.
Hann tók eina tablett úr hondini á manninum og hugdi at henni, sum um hon var lykilin til nakað, hann longu hevði mist.
Hjartað sló títt, men inni í honum bleiv alt klárt og ljósareytt.
Og tað føldist gott.

Tá tablettirnar ikki longur riggaðu, fann hann eina aðra loysn.
Eina tablett frá ommuni, sum hevði svøvntrupulleikar.
Eina frá eini vinkonu, sum hevði morfin fyri pínu.
Hann googlaði seg til restina:
"best combo for calm and energy".
Svarini lógu beint har.
Tað skuldi bara vera einaferð afturat.
Men tað varð byrjanin.

Mánadagarnir gjørdust tómir, og fitness-staðið fór at merkjast kalt og tómt.
Teitur royndi at ringja, men hann svaraði honum ikki.
Tá teir møttust, hevði Teitur eina damu og nýtt lív.
"Tú skuldi komið aftur," segði hann.
Men hann bara nikkaði, og hugdi burtur.
Hann visti, at hann longu var farin.

Apotekið gjørdist nýggja venjingarstøðin.
Hann visti, hvør var á vakt, hvør spurdi lítið.
"Skalt tú hava fixi-sett?" spurdi kassadaman.
Hon hevði sama tómleikan í eygunum hvørja ferð.
Hann smíltist hálvt.
"Tað er bara til reint brúk," segði hann.
Hon svaraði ikki.
Hon hevði sæð alt.

Steinatún bleiv hansara heim.
Tað, sum var hjartað í býnum, var nú hansara skuggalív.
Hann sat har við Mika og nøkrum øðrum – menn, sum altíð høvdu eina søgu, men ongantíð ein morgun.
Teir sótu har sum skuggarnir sjálvir, meðan fólk keyptu pizza og róptu eftir taxa, meðan bussarnir komu og fóru.
Og í skýmingini blivu teir ósjónligir.

Tá Mika hvarv, var tað, sum ein heilur heimur bara sløktist.
Tá dró hann seg burtur úr regninum, oman móti einum stað, hann hevði hoyrt um – fixirúmið.

Rúmið var hvítt, luktaði av spritti og kulda. Ljósrørið blaktraði stillisliga, sum ein pulsur úr eini aðrari verð.
Tað var kaldligt og tó tómt fyri dóm – bert stilli, sum um tíð og lív vóru steðgað.
Men inni stóð ein kvinna við mjúkum eygum.
"Ert tú nýggjur?" spurdi hon.
Hann nikkaði.

Hon peikaði á borðið. “Her er spritt, vatn og kompress. Tú kanst sita har. Eg eri her, um tú vilt tosa.”

Hon stóð tætt við hann, meðan hann sproytaði. Hond hennara rørdi borðið – ein so lítil, vanlig rørsla, men fyri hann kendist hon sum lív.
Hon hugdi ikki burtur.
Hon bara var.
Ein menniskjalig nærvera í einum sterilum rúmi.
Tá hon segði: “Tú ert meira enn hetta,” var tað næstan sum at hoyra ein prest í kirkjuni.
Men her vóru eingir sálmar. Bara orðaleys hjálp.

Seinni sama kvøld sat hann aftur í Steinatúni.
Bussarnir lýstu upp í regninum, og ein flokkur av fullum fólki kom út úr Blábar.
Ein genta steðgaði einum taxa: “Heim til Hoyvíkar!”
Alt livdi, men hann føldi seg sum royk millum teirra.
Tá tók hann telefonina og byrjaði at ganga.
Oman móti Gamla kirkjugarði.

Har var kvirt.
Trøini sveiggjaðu í vindinum, og gravsteinarnir vóru vátir og kaldir.
Hann lenaði seg móti garðinum, fingrarnir fingu følingina av køldum mosa.
Alt var hvítt og stilli. Einki tónleikabrak, einki fólk – bara vindurin og hansara egni andadráttur.
Tað kendist, sum um jørðin sjálv andaði við honum.
So festi eygað seg við QR-kotuna á portrinum.
Hann skannaði.
Skíggin lýsti myrkrið upp.
Ein grein: “Hendur, ið sleptu.”

Røddin í høvdinum las:
“Hon misti mannin á sjónum og sat eftir við nýggju børnum. Hon helt fram at spinna klæði og veva, tí onkur mátti halda fast. Tær kvinnurnar, sum sótu eftir, høvdu einki val. Tær máttu standa.”

Hann hugdi niður á hendurnar – hansara hendur vóru ikki arbeiðshendur, men hendur, sum høvdu slept.
Og hann hugsaði:
“Tey kláraðu seg, hóast alt. Tey svøltaðu, frystu og mistu alt, men reistu seg kortini upp aftur. Eg? Eg gavst. Tað var sjálvt lívið, sum segði: halt út - men eg lurtaði ikki. Eg vildi bara sleppa undan kuldanum, men endaði har, har eingin vildi vera.”

Á næsta gravsteini las hann bara eitt navn og eina staðfesting. Tað kundi eins væl verið hansara. Hann hugsaði um mammuna, sum enn sendi honum SMS-boð: ”Kom heim.” Hann

svaraði henni ongantíð.

Kuldin beit í hendurnar, men nú kendist hann øðrvísi.

Eitt ljós spegladist í eygum hansara.
Eitt minningarbrot av fitness-staðnum, Teiti, Mika – øllum teimum, sum høvdu hildið fast.
Hann mintist einaferð, tá Teitur hevði sagt: “Alt kann vendast, bara tú ikki gevur skarvin yvir.”
Hann hevði gloymt tað tá – men ikki nú.
Kanska hevði Mika ikki meint “gev upp” sum “geva seg”, men “gev lívinum loyvi at koma inn aftur.”

Tá hann fór niðan aftur móti býnum, sleit í, og ljósið frá reyðu bussunum spegladist á váta asfaltinum.
Steinatún var enn fult, men alt tóktist øðrvísi.
Hann fór framvið beinkinum, har Mika hevði sitið.
Hann steðgaði eina løtu, hugdi yvir økið og eitt lítið smíl sást á varrunum.
Ein maður fór framvið honum og hugdi niður á sína telefon. Men nú var tað hann, sum hugdi upp.

Hann visti ikki, hvat fór at henda.
Men hann visti, at hann ikki skuldi seta seg har aftur.
Og tá hann fór at ganga, kastaðu ljósini frá bussunum ein langan skugga framman fyri hann – og fyri fyrstu ferð í langa tíð gekk hann sjálvur inn í hann.